## Citroën C1



Komandi summar kemur ein nýggjur Citroën C1 á marknaðin. Bilurin verður gjørdur á eini nýggjari verksmiðju, sum PSA (Peugeot/Citroën) og Toyota í felag byggja í Kekkia

*Kelda: Nyt om Biler*

## Opel Astra 3D



Á komandi bilaframsýningini í Paris verður nýggi Opel Astra 3D við trimum hurðum fyrstu ferð alment sýndur fram. Motorarnir verða bæði diesel og bensin, og toppmodellið verður VXR við 230 hk

*Kelda: Nyt om Biler*

## Peugeot 1007



Tá Peugeot 1007 kemur á marknaðin, skal hann úttalast "túsund og sjey" og ikki "tíggju null sjey", tí tað líkist ov nógv talinum hjá James Bond, agent-007. Bilurin verður ein væl egnaður býbilur við dragihurðum á báðum síðum

*Kelda: Nyt om Biler*

# Fleiri nýggjheitir á veg frá Fiat



*Fiat 4x4 er ein sonevndur SUV (Sports Utility Vehicle) verður bygdur yvir Stilo plattformin*



*Ein av nýggjheitunum frá Fiat verður hesin stóri luksusbilurin við fimm hurðum, sum enn bert verður nevndur Fiat Large. Bilurin kemur á marknaðin í 2005.*

**Fiat eru mest kendir fyri sínar smáu og kviku bilar. Men síðan General Motors eru komnir inn í myndina sum samstarvsfelagar, eru ætlanir frammi um eisini at gera størri bilar. Fleiri nýggjheitir eru á veg**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í samstarvi við Gerneral Motors, sum er heimsins størsti bilframleiðari, eru ætlanir frammi um at koma á marknaðin við fleiri nýggjum Fiat bilum.

Fiat hava áður roynt seg við stórum bilum sum t.d. við Fiat 130 og Croma, men teir høvdu ikki eydnuna við sær.

Nú verður so roynt aftur í samstarvi við General Motors. Ein av nýggjheitunum verður ein lutfalsliga stórur luksusbilur við fimm hurðum, sum enn bert verður nevndur Fiat Large. Bilurin líkist Opel Signum og kemur á marknaðin í 2005.

Ein onnur nýggjheit verður ein 4x4, sum verður bygdur yvir Fiat Stilo plattformin. Bilurin, sum er teknaður hjá Pininfarina í Italia, var upprunaliga ætlaður sum eitt samstarv millum Fiat og Mitsubishi, men hetta samstarv stilnaði, tá DaimlerChrysler keyptu seg inn í Mitsubishi-konsernina.

Nú verður bilurin í staðin gjørdur í samstarvi við General Motors.

*Kelda: FDM*

# Saab 9-6 verður gjørdur í USA

**Síðan General Motors yvirtóku svensku Saab bilverksmiðjuna, verða Saab bilarnir alt meira japanskir ella amerikanskir. Saab 9-6 er ein 4x4, sum verður gjørdur á eini Subaru verksmiðju í USA**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Saab 9-6 verður ein væl útgjørdur luksusbilur, og fyrimyndin er Volvo XC90, sum er sera væl móttikin, serliga í USA.

Bilurin verður ikki ein ektaður Saab. Tekniskt er Saab 9-6 ein Subaru, og hann verður bygdur á eini Subaru verksmiðju í Indiana, USA.

Næsta ár kemur ein Saab 9-7, sum í veruleikanum er ein Chevrolet, og ein komandi Saab 9-2 verður ein Subaru Impreza.

Saab 9-6 verður gjørdur við amerikanska marknaðinum fyri eygað, men hann kemur eisini á evropeiska marknaðin.

*Kelda: FDM*



*Saab 9-6 verður ein sera væl útgjørdur luksusbilur, ið skal kappast við bilar sum t.d. Volvo XC90*




# HALDIÐ SOSIALIN



450,- um ársfjórðingin

- sparið 395,-

í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____
Bústaður: ____
Postnr.: ____
Bygd/býur: ____
Telefon nr.: ____
Undirskrift: ____

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO